# Føroyar - ES

## Áhugamál hjá føroyskum virkjum og stovnum

✧✧✧

**Upprit skrivað í sambandi við eftirútbúgving sendimann Føroya í Bruxelles**

# Inngangur

Í sambandi við setanina av einum føroyskum umboðsmanni í Bruxelles varð gjørd ein eftirútbúgvingarskrá fyri tann, ið settur varð. Partur av hesi skrá umfatar vitjanir á almennar stovnar og einstøk privat virkir, sum øll hava tað felags, at tey kunnu hugsast at hava eitt ávíst samskifti við ES. Vitjanirnar skuldu geva eitt innlit í, hvørji og hvar tey føroysku áhugamálini viðvíkjandi ES serliga eru.

Tað eru frásagnir frá hesum vitjanum, ið her eru niðurskrivaðar. Hesar frásagnir lýsa viðurskiftini millum Føroyar og ES sæð við eygunum hjá hesum stovnum og virkjum og eru ikki grundaðar á annað tilfar enn samrøðurnar. Hetta upprit er tí ikki egnað til at nýta sum skrivlig próvførsla, men er gott til at geva eina skjóta mynd av, hvar Føroyar eru í samskiftinum við ES, og hvussu henda støða kundi verði betrað.

Tórshavn 8 apríl 1998

Esther Dahl

I□□

## Vinnumálastýrið

Vinnumálastýrið tekur sær av allari føroyskari vinnu, undantikið fiskivinnu og sjóvinnu. Higartil hevur ikki verið rikin nakar málvísur vinnupolitikkur, men pengar eru nú avsettir á fíggjarlógini til orðan av einum virknum vinnupolitikki. Í hesum sambandi er eitt starvsfólk í vinnumálastýrinum á Ile of Man fyri at seta seg inn í teirra máta at reka ein virknan vinnupolitikk.

Innan aling verður í løtuni arbeitt við einum uppskoti til ein heilt nýggjan alipolitik. Hesin politikkur snýr seg um at gera hvønn fjørð til eina eind. Strembað verður ímóti, at ein eigari er fyri hvønn fjørðin, og at hesin eigari so sjálvur hevur avgerðarrættin yvir, hvussu alingin fer fram. Hetta tó treytað av, at ásett umhvørvis og heilsufrøðilig krøv verða hildin. Henda skipanin er fríari enn tann núverandi og kann í mangar mátar sammetast við núverandi hagaskipan.

Innan samskifti er í løtuni skipaður tann politikkur, at eitt felag tekur sær av, hvør skal hava rættin til at útbjóða samskifti. Rammurnar eru sostatt fastlagdar, men avvarðandi landsstýrismaður hevur tó heimild til at broyta hetta.

Innan landbúnaðin verður í nýggjum landbúnaðaráliti mælt til at umskipa landbúnaðin. Hetta skal millum annað gerast við at selja tey festi, ið verða mett at kunna klára seg uttan fíggjarligan stuðul. Tað skulu tó setast treytir við søluna, sum t.d. bústaðarskylda og landbúnaðarskylda. Harafturat verða krøv sett til keyparan. Hann skal vera minst 18 ár, føroyingur, reka garðin sjálvur, hava royndir innan landbúna og neyðuga útbúgving. Í sambandi við hesa nýggju skipan skulu tær jarðarfyrisitingarligu skipanirnar broytast. Høvuðsmálið við hesum uppskotinum er, at Føroyar skulu fáa meiri burturúr landbúnaðinum, og hildið verður, at hetta best verður gjørt við at lata ábyrgd og ræði fylgjast.

Oljuráðleggingarnevnd Landsstýrisins læt í 1997 frágreiðing um tær fyrireikingar, ið skulu gerast til eina møguliga oljuleiting. Millum annað er kannað, hvussu oljuvinnan møguliga kann ávirka náttúru, fiskiskap, búskap, mentan o.s.fr. Eisini verða nevnd krøv, ið helst skulu setast til trygd, arbeiðsumhvørvi, fyrisiting o.a. Miðað verður ímóti at stuðla føroyskum feløgum og einstaklingum soleiðis, at ágóðin av oljuni verður verandi í Føroyum. Lógin um hetta verður helst góðkend í februar. Síðan er sera týdningarmikið, at ein skattalóg, ið er serliga smíðað við atliti til oljuvinnuna, verður gjørd, og at útbjóðingartreytirnar verða ásettar (sí eisini síðu 6).

Samanumtikið kann sigast, at miðað verður ímóti einum meira virknum vinnupolitikki, ið hevur sum mál at taka av beinleiðis rakstrarstuðul og ístaðin skapa karmar, ið gera tað møguligt at hava eina berandi vinnu í Føroyum. Leiðin gongur sostatt fram ímóti at lata minni og minni stuðul til rakstur og heldur meira stuðul til mennandi tiltøk - mennandi innan tøkni og gransking, men eisini fyri at fáa meira burturúr.

Tá tosað verður um trupulleikar við ES, er tað mest loftið á royktum vørum, ið trupulleikar standast av. Um loftið er ov lágt, er ilt at siga, av tí at ein stórur partur av teimum royktu vørunum, ið verða útfluttar til ES, verða seldar undir referencu-prísinum og verða sostatt ikki íroknaðar kvotuna. Referencu-prísurin er ov høgur fyri teir føroysku framleiðararnar, og tann roykta vøran verður sostatt innflutt sum vanlig vøra og tollur goldin av henni. Hetta er sera keðiligt fyri føroyska framleiðaran, tí tollurin tekur stóran part av tí tilætlaða vinninginum. Harafturat er vandi fyri, at ES ákærir Føroyar fyri dumpingprís. Enn hevur hetta ikki verið ein trupulleiki, av tí at Føroyar eru lítlar í mun til t.d. Noreg, og av tí at føroyska vinnan er "væl" við skotsku vinnuna.

Nógvar av teimum føroysku vinnulógunum verða tilpassaðar ES-lóggávu eins og øðrum altjóða lóggávum og ásetingum. Sum áður nevnt er eitt møguligt krav um føroyskan frammíhjárætt í oljuvinnuni ímóti teimum fýra frælsunum í ES, og hetta kann tí koma at geva Føroyum trupulleikar í komandi samráðingum. Eins og Menningarstovan (síða 4) mælir Oljuráðleggingarnevndin tí til gjølla at kanna, hvørjar ávirkanir eitt nærri samband við antin ES ella EBS kemur at hava við sær.

## Menningarstovan

Menningarstovan er stovnur undir Vinnumálastýrinum, hvørs høvuðsuppgáva er at hjálpa føroysku vinnuni á glið. Heldur enn at hjálpa einstøkum fyritøkum hevur Menningarstovan valt at hjálpa heilum vinnugreinum. Hetta kemst av, at tað kann verða ringt at vera objektivur, tá ið fyritøkur skulu veljast út. Hóast Menningarstovan ikki hevur ES sum serligt arbeiðsumráðið, hava tey 4 starvsfólkini gjøgnum sína ráðgeving savnað eina vitan og eina ekspertisu innan ES-spurningar, ið ikki finst nógva staðir í Føroyum.

Orsakað av hesi vitan hevur stjórin á Menningarstovuni verið við í ymsum arbeiðsbólkum, ið hava viðgjørt umstøðurnar Føroyar - ES. Hann er nú við í felagsnevndini, ið ger upplegg til nýggjar samráðingar við ES og er tí varin við at siga sína hugsan um, hvørjar avleiðingar eru møguligar eftir teimum ymisku avtaluleistunum. Hann heldur tó, at besta avtala hevði helst verið ein EBS-líknandi avtala. Føroyar kunnu tó bert hava fullan limaskap í EBS við antin at vera limur í EFTA ella í ES, og hetta kunnu tær bert vera sum partur av Danmark. Við einum góðum vilja skuldi tað tó verði møguligt at gjørst limur í EFTA uttanum Danmark. Stjórin heldur tó ikki, at ein EBS-avtala er neyðug, bert Føroyar fáa eina avtala við ES, ið líkist EBS-avtaluni.

Størsti vansin við núverandi sáttmála við ES er, at ES krevur, at alt heilsufrøðiligt eftirlit verður gjørt av ES myndugleikum ella umboðum fyri ES myndugleikarnar. Hetta verður í Føroyum gjørt av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (sí síðu 9). Ein sera stórur partur av øllum sendingum verður tó eisini kannaður við ES-markið.Við EBS-avtaluni hava Noreg og Ísland fingið broytt hetta soleiðis, at eftirlitið fer fram í framleiðslulandinum, og vøran verður hereftir ikki kannað aftur. Noreg og Ísland eru sostatt við í heilsufrøðiliga økinum hjá ES. Av tí at marknaðurin er langt burtur, kann tað gerast dýrt at útflyta feskan fisk uttan at vita, um hann verður góðkendur ella ikki, tí verður hann aftursendur, er hann ov gamal, tá hann kemur til Føroyar. Tá ið talan er um útflutning av eitt nú feskum fiskavørum, hava Noreg og Ísland tí ein fyrimun fram um Føroyar. Ynskiligt er, at hetta verður broytt í einum komandi sáttmála.

Ein annar trupulleiki eru referencu-prísirnir, ið ES ásetur sum vegleiðandi søluprís. Allar vørur, ið verða seldar fyri minni enn referencu-prísin, verða ikki íroknaðar í tað tollfríu kvotuna. Flestu útflytandi virki hava trupulleikar av hesi skipan (sí síðu 23 og síðu 26). Av tí at teirra søluprísur liggur niðanfyri referencu-prísin, hava teir ikki møguleika fyri at brúka teirra kvotu og verða tí noyddir til at gjalda ásetta tollin. Ein annar trupulleiki við referencu-prísunum er, at hann er ásettur fyri heilar fiskar. Ynskir eitt virki at selja t.d. uggar, fer prísurin sjálvsagt undir ásetta referencu-prísin, av tí at tey góðu stykkini á fiskinum ikki eru við til at fáa prísin á hædd við referencu-prísin. Skipanin við referencu-prísinum skuldi tískil antin verið avtikin ella verið betur útgreinað.

Í komandi samráðingum við ES verður oljudirektivið væntandi eitt umráðið, ið fer at verða nógv umrøtt. Føroyingar ætla at skipa oljuvinnuna soleiðis at føroyingar fáa fyrimun av vinnuni, og tað er ímóti teimum 4 frælsunum í ES, nevniliga at vørur, tænastur, kapitalur og arbeiðsmegi skulu hava frítt at fara.

Skulu Føroyar fylgja ES-lóggávu á umhvørvisøkinum, fer hetta at krevja stórar broytingar í renovatiónsskipanini. Av tí at nógv avfall, ið kann endurnýtast, bert finst í smáum mongdum í Føroyum, verður torført at fáa eina nágreiniliga endurnýtslu til at mala runt fíggjarliga. Tað er tí ynskiligt at fáa, um ikki undantak, so at fáa eina skipan á hesum umráðnum, sum kann minka um útreiðslurnar til endurnýtslu.

Fyri at síggja hvørjar avleiðingar kunnu standast av teimum ymisku avtaluhættunum er sera týdningarmikið at kannað verður, hvørjar ES-lógir longu, via donsku lóggávuna, eru galdandi í Føroyum. Á henda hátt er eisini lættari at síggja, hvar trupulleikarnir liggja.

## Oljufyrisitingin

Oljufyrisitingin er stovnur undir Vinnumálastýrinum, og tekur sær av fyrireikingunum til eina møguliga føroyska oljuvinnu. Hetta arbeiði hevur sum so ikki so nógv við ES at gera, men Oljufyrisitingin er tó sera áhugað í, hvussu kolvetni verður viðgjørt í ES, og hvørji tiltøk og hvørjar broytingar eru væntandi. Av serligum ES-økjum, ið hava áhugan hjá Oljufyrisitingini eru loyvisdirektivið, gassdirektivið og kappingarviðurskifti bæði á kolvetnisumráðnum og sum heild.

Tá ið frágreiðingin frá oljuráðleggingarnevndini varð gjørd í 1997, varð millum annað hugt eftir ES lóggávuni og øðrum viðurskiftum, ið høvdu við kolvetni at gera. Hetta varð gjørt, tí at Føroyar ikki hava nakra roynd innan henda ídnað og eisini fyri lættari at kunna fylgja við á økinum. Serliga hevur tað verið innan trygd og arbeiðsumhvørvi, at skeitt hevur verið í ES-lóggávuna. Tó eru eisini aðrar lóggávur nýttar sum grundarlag t.d. tann norska.

Í Oljufyrisitingini verður hildið, at tann broyting í føroysku kolvetnislógini, sum skuldi til, fyri at lógin kundi verða samtykt í løgtinginum, er ov langt frá altjóða rákinum innan samhandil. Rákið gongur móti fríhandli, meðan kolvetnislógin er sera protektionistisk. Hildið verður tó ikki, at hetta kann forða feløgum at koma hendanvegin, men ótti er fyri, at føroysk feløg, ið skulu arbeiða í oljuvinnuni, koma at verða á lægri støði enn líknandi útlendsk feløg. Føroysku feløgini skulu nýtast undir øllum umstøðum, og í staðin fyri at kappast á altjóða støði koma tey at kappast á føroyskum støði.

Tá leitiskeiðið byrjar verður tørvur á stórum serkunnleika innan júst hetta øki, og hesin serkunnleiki finst ikki í Føroyum í dag. Tí verður neyðugt at fáa útlendskt know-how innført í føroysku oljuvinnuna. So langt er nú komið við kanningunum av undirgrundini kring Føroyar, at tað væntandi kann farast undir útbjóðingar til royndarboringar um eini tvey ár. Hetta er tó treytað av, at marknaðartrætan millum Føroyar og Bretland verður loyst áðrenn ta tíð.

## Ferðaráð Føroya

Ferðaráð Føroya hevur til høvuðsendamáls at menna føroysku ferðavinnuna. Hendan menning skal skapast við at betra myndina av Føroyum sum ferðavinnuland, samstundis sum hin føroyska mentanin og náttúran vera varðveitt. Arbeiðið hjá Ferðaráðnum er enn á byrjunarstøði, av tí at ikki verulig gongd fekst á at samskipa arbeiðið fyrr enn í 1992. Trupulleikar hava eisini verið ímillum vinnuna og Ferðaráðið, av tí at vinnan ofta sær Ferðaráð Føroya sum ein mótstøðupart. Hetta kemur helst av, at Ferðaráðið er í tí støðu, at tað skal arbeiða bæði fyri tað almenna og tað privata. Av somu orsøk er stýrið fyri Ferðaráðið sett saman av tveimum umboðum, ið vinnan velur og einum umboði, ið Føroya Landstýri velur. Tað er Vinnumálastýrið, ið umsitur ferðavinnuna.

Ferðaráð Føroya er við í VTB (Vestnorden Tourist Board), ið er eitt samtak millum Grønland, Ísland og Føroyar. VTB skipar fyri ferðamessum og øðrum tiltøkum fyri ferðasmiðjum og øðrum áhugaðum í hesum reisumálum. Í altjóða høpi eru Grønland, Ísland og Føroyar sera lítil reisumál, og tí er týdningarmikið, at hesi lond standa saman. Samarbeiðið landanna millum virkar sera væl.

Ferðaráðið er eisini við í FITUR, ið er eitt føroyskt-íslendskt samstarv, ið hevur til endamáls at betra sambandið millum londini. Ferðaráðið metur tað ikki vera rætt, at Ferðaráðið er noytt at lata pengar til FITUR, av tí at Ráðið ongan ræðisrætt hevur yvir pengunum. Endamálið við FITUR er heldur ikki serstakt fyri ferðavinnuna, men eisini skúlaklassar og sangkór verða stuðlað av FITUR.

Í sínum arbeiði at menna ferðavinnuna innanlands, leggur Ferðaráð Føroya stóran dent á at verja umhvørvi, samstundis sum góðskan verður gjørd betri. Eisini verður dentur lagdur á, at føroysk gistingarhús, matstovur, vallaraheim o.t. vera góðskumett soleiðis, at ferðamaðurin veit, hvat hann kann

vænta. Á hesum økinum brúkar Ferðaráðið eina skipan úr Skotlandi, og henda skipan verður mett at vera meira framkomin enn tann danska og tann íslendska. Grønlendska ferðaráðið hevur víst áhuga fyri hesi skipan, og fer væntandi at innføra hana í Grønlandi.

Ein stórur trupulleiki hjá tí føroysku ferðavinnuni sum heild er, at alt ov fá hagtøl eru til taks. Hetta ger, at tað er sera trupult at vita, hvat tað eru fyri fólk, sum koma til Føroyar, og hví tey koma til Føroyar. Ein manglandi vitan á hesum økinum hevur við sær, at trupult er at hava eina málrættaða marknaðarføring. Tað er tó ringt at loysa henda trupulleika til fulnar, tí tað eru ikki pengar til at broyta hesi viðurskifti. Til tess at royna at loysa henda trupulleikan verður hugt eftir hagtølum úr londunum kring okkum. Eisini verða spurnarbløð latin teimum ferðafólkum, ið fáa faldarar tilsendar. Ferðaráð Føroya hevur harafturat eitt sera gott samstarv við Danmarks Turistråd.

Fyri at halda tænastustøðinum uppi innan føroysku ferðavinnuna er alneyðugt at útbúgva fleiri fólk. Alt ov nógv av teimum fólkum, ið arbeiða innan ferðavinnuna eru sjálvlærd. Hetta ger, at tað er trupult at fáa fólk at síggja Føroyar sum eina heild, og í staðin fyri at samarbeiða verður arbeitt fyri egnum vinningi. Hetta kann verða skaðiligt bæði fyri náttúru og mentunnarlívið í Føroyum.

Ferðaráð Føroya hevur stóran áhuga í at fáa meira at vita um stuðulsskipanir ES innan ferðavinnuna, tí tey hava frætt, at onnur lond enn ES-lond hava fingið fíggjarligan stuðul úr ES. ES hevur eitt program fyri ferðavinnuna í Europa, ið kallast Philoxenia (gestablíðni). Hendan skipan er bert ætlað ES-londum, men møguleiki er eisini hjá londum, ið hava assosieringsavtalu ella Evropaavtalu við ES at fáa nyttu av hesi skipan. Av tí at Føroyar hvørki so ella so eru við í ES, eru ikki útlit til, at Føroyar kunnu fáa ferðavinnustuðul úr ES.

## <u>Heilsufrøðiliga Starvsstovan</u>

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hoyrir undir Vinnumálastýrið. Stovnurin er býttur upp í tríggjar deildir: Fiskivinnudeildin, matvørudeildin og umhvørvisdeildin. Afturat hesum deildum er ein umsitingardeild, ein royndarstova innan evnafrøði og ein royndarstova innan erlívfrøði (mikrobiologi). Høvuðsuppgáva Starvsstovunnar er fyri landsstýrið at røkja uppgávur á umhvørvis- og matvøruøkinum. Harafturat átekur

Starvsstovan sær eisini uppgávur fyri privat virkir og stovnar, ímóti at hesi gjalda fyri tað. Fyri at halda trúnaðarstøðinum skulu eingir upplýsingar fara frá royndarstovunum til hinar deildirnar, um ikki almenna heilsustøðan er í vanda. Tilsamans 32 fólk arbeiða á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni umframt tey, ið eru tilknýtt starvsstovuni í sambandi við serligar verkætlanir.

Tá ið Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal fara undir nýggjar verkætlanir krevst figging uttanífrá. Ofta hevur verið lættast at fingið figging í norðurlendskum høpi, men nú eru eisini føroysk virkir og føroyskar kommunur byrjað at stuðla ymsum verkætlanum. Hetta verður mett sum eitt tekin uppá, at føroyingar eru byrjaðir at skilja týdningin av kanningum innan heilsufrøði.

Í løtuni eru Føroyar ikki við í tí heilsufrøðiliga økinum hjá ES. Hetta merkir, at allar sendingar av fiski og øðrum matvørum, ið verða útfluttar til ES-marknaðin, skulu góðkennast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Hetta arbeiði liggur hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, av tí at hon er góðkend av ES sum nóg góður eftirlitsstovnur. Í hesum sambandi hava ES myndugleikar úr DGVI verið í Føroyum tvær ferðir. Fyrru ferðina fyri at kanna um umstøður sum t.d. lógir, høli og vitan, vóru á góðkenniligum støði. Onnur ferðin var ein eftirlitsvitjan, og her varð eisini farið út á virkini fyri at vita, um eftirlitið hjá starvsstovuni var nóg gott. Tann frágreiðingin, ið varð gjørd eftir hesa vitjan, var sera atfinningarsom og vísti, at skipanin millum Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og ES var á markinum til at verða vrakað av ES. Skipanin slapp tó at halda áfram, og nú er betrað um nógv av økjunum, funnist varð at.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan tekur 6 kr/tonsi fyri at geva ES-góðkenning til sendingarnar, ið skulu av landinum. Góðkenningin er ein heilsuváttan, sum verður útfylt av virkinum og váttað av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Orka er ikki til at taka royndir av øllum sendingum, tí er tað fyri tað mesta "pappírgóðkenningar", ið verða gjørdar.

Í heilsuváttanini skal eftir ES-lóggávu standa, at vøran er úr Føroyum, t.v.s. Faroe Islands. Í nøkur ár hevur tó verið arbeitt við at fáa hetta broytt, soleiðis at tað bert skal standa FO, men trupult er at fáa hetta viðtikið í ES. Gerast Føroyar partur av heilsufrøðiliga umráðnum hjá ES, verður hesin trupulleiki loystur, tí tá fella hesar góðkenningar burtur. Hetta fer at lætta um fyrisitingarliga arbeiði, men verður sæð burtur frá tí, verða helst ikki tær stóru broytingarnar í arbeiðinum á sjálvari starvsstovuni. Broytingarnar fara at merkjast best úti á virkjunum og hjá útflytarunum.

ES-myndugleikarnir krevja at øll virkir, ið útflyta til ES, verða løggildað av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Virkini koma á ein lista, ið verður sendur ES-myndugleikunum. Hesir listar eru til stóran ampa hjá føroysku framleiðarunum. Frá at listarnir verða sendir úr Føroyum til Bruxelles, og til teir úr Bruxelles eru spjaddir til allar havnir, gongur lang tíð, onkuntíð meira enn eitt hálvt ár. Hetta gevur trupulleikar, tí hóast tað framleiðandi virkið er góðkent, manglar tað á tí ikki dagførda listanum hjá innflytaranum. Tann føroyski útflytarin kann tí ikki útflyta fisk til ES, sum er høvuðsmarknaður Føroya. Hetta er sjálvsagt sera óheppið.

Gerast Føroyar partur av heilsufrøðiliga økinum hjá ES, skulu hesir listar alsamt sendast inn. Kannast má tí, um listarnir hjá hinum ES-londunum hava líka langa tíð um at koma út til havnirnar, ella um hetta er ein serføroyskur trupulleiki. Er trupulleikin serføroyskur, er týdningarmikið at fáa hetta broytt.

Ikki allir trupulleikar koma av ES-orsøkum. Ofta ganga føroysku útflytararnir ov leyst um, tá ið heilsuváttanin verður útfylt. Hetta ger, at sendingin verður steðgað í ES-havnini, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan má so loysa knútin. Tað tekur ikki langa tíð at loysa hesar trupulleikar, men teir eru orkukrevjandi, og við góðum vilja frá virkjunum slapst undan teimum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan heldur eisini eyga við øllum teimum matvørum, ið verða innfluttar til Føroya. Um nakað, ið er til heilsuligan vanda fyri almenningin, verður funnið, hevur Starvsstovan skyldu til at geva boð frá sær, eisini til onnur lond. Somu skyldu hava onnur lond mótvegis Føroyum. Boðini um farligar bakteriur o.l. verða givnar yvir “Hot Food Line”, ið er ein altjóða stovnur, ið millum annað samskipar hesar bakteriuávaringar.

Tá tað kemur til innflutningin av livandi djórum, er tað landsdjóralæknin, ið hevur ábyrgdina. Í løtuni verður arbeitt við at gera nýggja lóg um sjúkur hjá djórum, og hvussu tær skulu viðgerast. Núverandi lóg er frá 1908 og er sera ótíðarhóskandi. Millum annað var koppsetingarevni ikki til í 1908, og einasti møguleiki fyri at hindra sjúkum at koma til Føroya var at nokta innflutningi. Nú á døgum eru fleiri møguleikar, og tí eigur lógin at verða liberaliserað. Undir arbeiðnum við lógini verður hugt eftir altjóða lóggávu m.a. ES-lóggávuni.

Fyri at Føroyar á hesum øki skulu kunna góðkennast sum limur í heilsufrøðiliga økinum hjá ES, skulu tær vera limur í OIE, ið er ein altjóða felagsskapur, sum arbeiðir við umfarssjúkum hjá djórum og sjúkum, ið

kunnu smitta til menniskju. Fyri at kunna gerast limur í OIE, skal lóggávan vera tíðarhóskandi og fylgja altjóða ásetingum. Við núverandi lóg frá 1908 kunnu Føroyar ikki gerast limur í OIE.

Hesin manglandi limaskapur ger, at Føroyar ikki eru góðkendar sum útflytari av livandi djórum og mati, ið ikki er framleiddur undir skipaðum umstøðum. Hetta ávirkar t.d. útflutningin av skerpikjøti, grind og føroyskum hestum.

Føroyar hava alment innflutningsbann til livandi djór, men undantaksloyvi verða givin. Hesi verða m.a. givin til innflutning av íslendskum rossum, kelidýrum, førarahundum o.l.. Loyvi verður tó ikki givið til fólk, ið koma til Føroyar at ferðast og ynskja at hava hundin ella kettuna við. Gerast Føroyar limur í OIE, kann eitt innflutningsbann bert vera galdandi fyri djór við sjúkum, ið ikki finnast í Føroyum.

## Fiskimálastýrið

Fiskimálastýrið umsitur alt, ið hevur við fiski- og sjóvinnu í Føroyum at gera. Alifiskur er tó undir Vinnumálastýrinum. Fiskimálastýrið hevur millum annað ábyrgdina av fiskarísamráðingunum við ES, ið eru eina ferð um árið. Hesar samráðingar eru vanliga ikki so tungar, av tí at tað ofta eru tær somu kvoturnar, ið verða nýttar ár eftir ár. Tó er væntandi, at um makrelurin av álvara verður umrøddur, verða samráðingarnar tungar. Trupulleikin við makrelinum er, at Føroyar hava yvir fyri ES bundið seg til ikki at fiska meira enn uml. 12.000 t árliga, samstundis sum Føroyar hava givið Russlandi loyvi til at hava 18% av makreli í hjáveiðu, t.v.s. uml. 25.000 t. Hetta fyri at fáa fiskirættindi í Barentshavinum.

Nógvur sokallaður pappírfiskur er í fiskarísáttmálanum millum Føroyar og ES. Pappírfiskur er fiskur, íð er í sáttmálanum, men sum ikki verður fiskaður. Tað mesta av hesum pappírfiski er í ES-kvotunum í føroyskum sjógvi. Hesin pappírfiskur stendst ofta av, at ES skip altíð uppfiska toska- og hýsukvotuna fyrst, og so kunnu skipini ikki fiska hin botnfiskin, tí tað er altíð eitt sindur av toski ella hýsu við sum hjáveiða. Hetta ger, at í veruleikanum er ein føroysk yvirvág í fiskarísáttmálanum.

Hesar árligu samráðingar, ið annað hvørt ár eru í Føroyum og annað hvørt í Bruxelles, føra við sær, at Fiskimálastýrið hevur gott samband, bæði formelt og óformelt, við embætisfólkið í ES. Tó eru onkrir

trupulleikar í hesum sambandi. T.d. er viðgerðartíðin í ES alt ov long, tá ið føroysk skip skulu góðkennast til fiskiskap í ES sjógvi. Viðgerðartíðin er í ES upp til 10 dagar, og í Føroyum tekur tað bert nakrar fáar minuttir at góðkenna eitt ES-skip. Hetta er sera óheppi, tí at ofta liggja skipini og bíða eftir loyvinum, og missa sostatt inntøku, meðan bíðað verður.

Fiskiveiðieftirlitið, ið hoyrir undir Fiskimálastýrið, hevur eftirlit við øllum føroyskum skipum og eisini útlendskum skipum, ið fiska í føroyskum sjógvi. Eisini er eftirlit við landingum, og um kvotur og fiskidagar eru í lagi. Ymsir trupulleikar hava staðist av, at føroysk skip kunnu landa fisk, ið er fiskaður undir Føroyum, á ES-marknaðinum, uttan at Fiskiveiðieftirlitið fær boð um hetta. Skip hava sostatt kunnað uppgivið eitt tonsatal til Fiskiveiðieftirlitið, hóast tann veruliga vektin er ein onnur, og hervið hava skipini fiskað meira enn ásettu kvotuna.

Eisini hava trupulleikar staðist av "vasking" av fiski. At vaska fiskin vil í hesum sambandi siga, at eitt skip sendir fráboðan um, at tað kemur at landa t.d. rossamakrel. Tá ið landað verður, er tað makrelur, ið er umborð. Henda "vasking" verður framd, av tí at kvotan av makreli er nógv minni enn kvotan av rossamakreli. Fyri at henda "skipan" skal virka, eru virkini við í hesum. Orsøkin til, at tey eru við í hesum er, at tað er sera týdningarmikið hjá teimum at fáa so nógvan fisk at arbeiða sum gjørligt.

Fyri at fáa loyst hesar trupulleikar hava Fiskiveiðieftirlitið og ES gjørt samstarvsavtalu hesum viðvíkjandi. Fyrr hevur ES ikki havt møguleika fyri at kanna landingar í Føroyum, og Føroyar hava ikki havt henda møguleika í ES. Við núverandi avtalu skal Fiskiveiðieftirlitið senda yvirlit yvir allar ES-landingar í Føroyum til røttu myndugleikarnar í ES. Hesir myndugleikar senda so tøl yvir føroyskar landingar í ES-londum til Fiskiveiðieftirlitið. Hendan skipan er tó enn so nýggj, at ikki øll lond í ES hava fingið hana at virka. T.d. eru tølini úr Skotlandi skrivað við hond. Eisini eru nøkur lond haðani ongi tøl koma. Tað er tí ynskiligt, at ein standardur verður settur fyri, hvussu hesi tøl skulu viðgerast og sendast víðari.

Grindadráp og hvalamál sum heild vera eisini umsitin av Fiskimálastýrinum. Í hesum sambandi eru Føroyar umboðaðar av Danmark í IWC (International Whaling Commision). Av tí at londini í Norðuratlantshavi ikki hildu, at IWC røkti áhugamál teirra í nóg stóran mun, stovnaðu Grønland, Noreg, Ísland og Føroyar í 1992 NAMMCO (North Atlantic Marine Mammal Commision). Har sum IWC ofta arbeiðir fyri at friða hvalin sum heild, hevur NAMMCO til endamáls at tryggja gransking og burðardygga gagnnýtan og menning av hvalinum. Afturat hesum báðum felagsskapum hevur Fiskimálastýrið samstarv

við áhugafelagsskapin High North Alliance, ið hevur heimstað á Lofoten, og har Grindamannafelagið er limur.

Fiskimálastýrið metir tað sum verandi sera týdningarmikið at vera væl kunnaður um hvalaviðurskifti. Hetta er besta vápnið ímóti teimum, ið vilja grindadrápinum at bana. Hesi eru umframt altjóða umhvørvisfelagsskapir eisini flestu lond í IWC, ES íroknað. Ein neyv vitan um grindadráp og um hvalin sum heild skal tó eisini nýtast til at gera grindadrápið so "menniskjansligt" sum gjørligt.

## Sjóvinnufyrisitingin

Sjóvinnufyrisitingin hoyrir undir Fiskimálastýrið og hevur tríggjar høvuðsuppgávur. Hon skal taka sær av sjóvinnufyrisitingini sum heild, av skipaskrásetingini og av partafelagsskrásetingini. Hvørt høvuðsumráði fevnir um ávísar lógir. Sjóvinnufyrisitingin fevnir um fýra lógir, ið eru manningar- og mynstringarlógin, sjóvinnulógin, sjómanslógin og "lov om skibes sikkerhed". Síðstnevnda lógarumráði hoyrir undir ríkislóggávuna og verður í veruleikanum umsitið av Søfartsstyrelsen (Skipaeftirlitið). Hini trý umráðini eru føroyskt lógarumráði. Undir skipaskrásetingina hoyra lógin um skráseting av skipum og lógin um Føroya Altjóða Skipaskrá - FAS. Av tí at partafelagslógin ikki beinleiðis hevur við altjóða skipaferðslu at gera, verður hon ikki viðgjørd her.

Tað mesta av arbeiðnum hjá Sjóvinnufyrisitingini er avmarkað til at umfata Føroyar og føroysk viðurskifti. Altjóða reglur og ávísingar, ið fyri tað mesta hava við trygd og tekniska útgerð at gera ("lov om skibes sikkerhed"), verða gjørdar í IMO - International Maritime Organisation. IMO ger konventiónir, sum so skulu góðtakast av limalondunum. Londini skulu sjálvi syrgja fyri, at konventiónirnar verða settar í gildi, og føroysku myndugleikarnir eru ofta skjótir at gera hetta. Verður samanborið við ES, so er avgerðar- og avgreiðslutíðin har nógv drúgvari. Á nógvum umráðum eru føroysku lógirnar sostatt nýggjari og tí ofta strangari. Sum nevnt er hetta umráðið ríkismál, og Føroyar eru tí limur í IMO sum partur av Danmark, t.v.s. at eitt umboð frá Sjóvinnufyrisitingini er við Søfartsstyrelsen á fundi í IMO. Hetta hevur higartil ikki givið trupulleikar.

Tá ið tað snýr seg um sjóvinnulógina, sjómanslógina og manningar- og mynstringarlógina eru hesar, sum longu nevnt, føroyskar. Hóast tað ikki er neyðugt at seta tær donsku lógirnar í verk á hesum umráðunum, so verður tað ofta gjørt. Tað vil siga, at føroyska, danska og soleiðis eisini ES-lóggávan líkast á nógvum, um ikki øllum, økjum. Frá føroyskari síðu verður hetta gjørt fyri at gera tað lættari at arbeiða í altjóða høpi, t.d. kunnu føroysku útbúgvingarnar javnmetast við tær donsku og soleiðis eisini við tær í hinum ES-londunum. Tó skal ein føroyingur flyta til Danmarkar fyrst, áðrenn hann fær rætt til at gerast arbeiðstakari í øðrum ES-londum.

Føroysku lógirnar bróta tó frá á ymsum økjum. Til dømis kunnu donsku myndugleikarnir, vegna eitt av teimum fýra frælsunum, ikki seta sum krav, at yvirmenninir á einum skipi eru danir. Hetta krav kunnu føroysku myndugleikarnir seta, og tað er við í føroysku lóggávuni.

Av tí at Føroyar ofta eru skjótari enn ES til at seta IMO-konventiónirnar í gildi, eru eingir trupulleikar av Port State Control, sum er eitt eftirlit, ið skal tryggja, at tey skip, sum koma í havn hjá limalondunum í IMO, uppfylla tær viðtiknu konventiónirnar. Hetta eftirlit verður vanliga bert nýtt, um eitt limaland hevur grundaðan illgruna til, at ikki alt er í lagi umborð, og tá mett verður, at skipið kann vera til vanda fyri skipaferðsluna. ES saman við nøkrum eystureuropeiskum londum hevur tó strangari eftirlit, av tí at tað her er avgjørt at kanna minst 25% av skipunum. Í hesum londum er reglan um grundaðan illgruna sostatt ikki galdandi. Lýkur eitt skip ikki IMO-treytirnar, hava myndugleikarnir rætt til at nokta skipinum at fara úr havn.

Tá ið tosað verður um trupulleikar við ES hevur Sjóvinnufyrisitingin sostatt ongar, einamest tí at einki samband er millum ES og Sjóvinnufyrisitingina. Stjórin á Sjóvinnufyrisitingini sær tó FAS skipanina sum ein møguleika til at fáa skip at vera skrásett í Føroyum heldur enn í ES-londum og við hesum skapa ein inntøkumøguleika til føroyska samfelagið. Hetta skal gerast við at hava lagaligari treytir, uttan tó at seta strongu trygdarkrøvini úr gildi. Til dømis er skattaumráðið eitt umráðið, ið kann nýtast til at fáa fleiri skip skrásett í Føroyum.

## Fiskirannsóknarstovan

Fiskirannsóknarstovan er stovnur undir Fiskimálastýrinum. Har arbeiða 20 fólk umframt manningina á Magnus Heinasyni, ið telur 15 mans. Arbeiðsmegin er sett við fiskifrøðingum, havfrøðingum, lívfrøðingum, hagfrøðingum, verkfrøðingum, datalogum, assistentum og umsitingarfólki.

Uppgávan hjá stovninum er at savna lívfrøðiliga vitan um lívið í havinum kring Føroyar og at ráðgeva í málum, sum eru knýtt at hesum. Afturat hesum hevur Fiskirannsóknarstovan eitt sindur av undirvísing, men hetta er sera lítil partur av virksemi hennara. Granskararnir arbeiða mest við "anvendari" gransking og eitt sindur við grundgransking. Ynskiligt er tó, at fíggjarlig orka hevði verið til meira grundgransking. Grundgranskingin er neyðug skulu føroysku granskararnir, sum eru góðir, eisini í altjóða eygum, hava møguleika fyri at fylgja við menningini innan teirra øki.

Áðrenn Noreg og Ísland fóru uppí EBS, og Svøríki og Finnland fóru uppí ES, vóru Føroyar væl við í norrøna granskingarsamarbeiðnum. Hetta samarbeiði gekk ígjøgnum NORFA (Nordisk Forsker Akademi), ið er undir Norrøna Ráðnum. NORFA er enn til, men Finnland, Svøríki, Noreg og Ísland arbeiða nú meiri saman í teimum granskingarverkætlanum, ið eru í ES-høpi. Serliga Ísland hevur útnytta henda møguleika til fulnar, og stórur vandi er fyri, at Føroyar gerast eftirbátur, um ikki møguleiki fæst fyri at verða við í ES-verkætlanum.

Sum grundregla hevur Fiskirannsóknarstovan møguleikan fyri at vera við í verkætlanunum, men í veruleikanum er hetta ógjørligt. Fyri at vera við sum triðjaland skal eitt gjald, ið er útroknað eftir bruttotjóðarúrtøku og eftir, hvat rammuverkætlanin kostar, gjaldast. Gjaldið hevur onkustaðni verið mett til 1,5 - 2 mill. árliga. Av tí at fíggjarliga orkan ikki finst, er neyðugt at søkja um fígging til hvørja verkætlan sær, og hetta hevur stovan ikki arbeiðsorku til. Um Føroyar fingu eina EBS líknandi avtalu, kundu føroyskir granskarar verið við í kappingini um luttøku í øllum rammuverkætlanunum. Gjaldast skal tó eitt tilmeldingargjald, men hetta er minni enn tað, ein skal gjalda sum triðjaland. Til dømis er gjaldið fyri Noreg 1,6% av kostnaðinum á verkætlanunum.

Fiskirannsóknarstovan hevur kortini verið við í onkrari verkætlan sum undirútvegari. Tann eina verkætlanin var TASC, ið merkir TransAtlantic Studies of Calanos. Calanos er eitt lítið djóraplankton, ið

er sera týdningarmikið sum føðidjór í havumhvørvinum. Her fekk Fiskirannsóknarstovan pening til, at ein av granskarunum kundi fáa eitt hjálparfólk afturat sær, meðan arbeitt varð við verkætlanini.

Í løtuni skal Fiskirannsóknarstovan vera við í einum verkætlan, har arbeiðast skal við nitrum, og hvussu tær skulu nýtast til at skráseta aldur, ferðingarmynstur o.l.. Av tí at Fiskirannsóknarstovan hevur arbeitt við nitrum á alistøðini við Áir, skal eitt fólk av Fiskirannsóknarstovuni til Svøríkis at arbeiða eina tíð.

Fiskirannsóknarstovan er vorðin boðin við til hesar báðar verkætlanir. Fiskirannsóknarstovan, er ikki virkin í leitanini eftir verkætlanum, har tey kunnu virka sum undirútvegarar, av tí at royndirnar vísa, at hetta ikki ber til. Hetta tí at limalondini er bangin fyri at verða ákærd fyri positiva serviðgerð av Føroyum, eftirsum Føroyar ikki eru limir í ES ella EBS. Føroyar verða sostatt ikki alment boðin at vera undirleverandørar. Tey verða bert biðin at vera við, um Fiskirannsóknarstovan hevur servitan á umráðnum, sum t.d. við nitrunum.

Heldur ikki ber til at lata føroyskar granskarar ella ph.d. lesandi fara uttanlanda at granska sum lið í eini umbýtisskipan. Eisini her eru Føroyar settar uttanfyri vegna tað, at øll hini norðurlondini onkusvegna er við í europeiska samarbeiðnum á hesum økið. Bert Grønland og Føroyar eru eftir, og støða Grønlands í ES er ørvísi enn tann Føroyska, við tað at Grønland verður mett sum OLT-land.

Tað er tí alneyðugt, at Føroyar fáa granskingar og undirvísingarumráðið við í komandi samráðingar, soleiðis at Føroyar ikki verða afturúrsigldar, hvat vitan viðvíkjur.

## Fróðskaparsetur Føroya

Fróðskaparsetri hevur umleið 60 lesandi, og umleið 20 fólk starvast fast á stovninum. Av hesum eru umleið 15 vísindalig størv. Nøkur størv eru Fróðskaparsetri og t.d. Fiskirannsóknarstovan felags um.

Fróðskaparsetri hevur tríggjar deildir: Føroyamálsdeildina, Søgu - og Samfelagsdeildina og Náttúruvísindadeildina. Av tí at allar deildirnar hava somu trupuleikar, tá tosað verður um altjóða og ES-viðurskifti, verða tær viðgjørdar undir einum.

Útbúgvingarnar, ið ein kann fáa á Fróðskaparsetrinum eru uppbygdar eftir sama leisti sum líknandi danskar útbúgvingarnar, tó at føroysk viðurskifti sjálvsagt eru partur av føroysku undirvísingini. Tó hava lesandi í Danmark og øðrum Norðurlondum betur møguleikar, tá ið tað snýr seg um at fara til onnur lond at lesa. Hetta tí at Føroyar eru uttanfyri ES og EBS, og føroysk lesandi skulu sostatt gjalda ein sera høgan prís fyri at ganga á lærdum háskúlum í t.d. Onglandi. Um hesi viðurskifti vóru lagaligari, høvdu kanska fleiri ung valgt at gingið á Fróðskaparsetrinum, heldur enn á donskum lærustovnum.

Tað hevur tó verið roynt at fáa lesandi úr Føroyum til at fara uttanlands. Søgu- og samfelagsdeildin hevur havt samarbeið við Robert Gordon University í Skotlandi. Her var avtala gjørd við 2 oljufeløg, sum stuðlaðu teimum lesandi við at gjalda skúlakostnaðin. Samstarvið datt niðurfyri, tá ið tær ringu tíðirnar komu í Føroyum fyrst í 90-unum, men tosað verður nú um at seta tað í verk aftur. Eina líknandi avtalu hevur Náttúruvísinadadeildin gjørt við ein lærdan háskúla í Stavanger í samband við nýggju kolvetnisverkfrøðingaútbúgvingina.

Granskingin á Fróðskaparsetrinum verður mett at vera á sama støði sum aðrastaðir í Europa. Føroysku granskararnir verða eisini nýttir sum próvdómarar í øðrum londum og sum "referees" hjá altjóða vísindaligum tíðarritum. Eisini verða útlendskir próvdómarar nýttir í Føroyum, fyri at stovnurin ikki skal koyra fastur í síni egnu verð. Ein stórur trupuleiki hjá granskarunum er, at bert ein serfrøðingur er á hvørjum øki, og at peningur ikki er tøkur til vikarløn. Hetta ger, at tað er sera trupult í styttri tíðarskeið at granska aðrastaðni og samstundis vera knýttur at Fróðskaparsetrinum. Føroysku granskararnir royna tó at vera við í norðurlendskum granskingartiltøkum, t.d. NORDPLUS, og granskarar uttanífrá koma við jøvnum millumbilum til Føroya. Hetta er við til at halda fakliga støðinum uppi.

Ein stórur trupuleiki í samband við gransking er, at føroyskir granskarar ikki hava møguleika at luttaka í europeiskum granskingarverkætlanum. Hóast figgjarligar umstøður ikki eru til at luttaka í nógvum verkætlanum, eru tó nakrar, ið eru sera áhugaverdar og týdningarmiklar fyri føroyskar granskarar.

Sum longu nevnt hava føroysku granskararnir møguleika at vera við í ES-verkætlanum sum undirútvegarar. Trupuleikin her er bert at Fróðskaparsetri ikki hoyrir um hesar verkætlanir, fyrrenn ov seint er at fyrireika seg uppá at innsenda tilboð um at vera við. Tað er tískil týdningarmikið, at eitt umboð í Bruxelles hevur eyguni við hvørji tilboð eru í umbúna og gevur boð til rætta viðkomandi í Føroyum.

## Náttúrugripasavnið

Føroya Náttúrugripasavn, ið er stovnað í 1955, er sett saman av trimum deildum. Plantudeildini, jarðfrøðisdeildini og djóradeildini. Tilsamans starvast 15 fólk á savninum, harav 8 á jarðfrøðisdeildini.

Bert eitt fólk arbeiðir á plantudeildini. Av tí at hetta fólk skal taka sær av øllum tí fyrisitingarliga við síðina av at granska, er tíðin til gransking og skráseting ógvuliga skerd. Deildin arbeiðir tó við trimum verkætlanum. Tað týdningarmesta í løtuni er at gera lidna eina bók um føroyska flora, ið væntandi kemur út komandi summar. Harafturat arbeiðir deildin við at gera status og strategi til innføran og yvirhaldan av konventiónini um lívfrøðismargfaldni (biodiversitets-konventiónin) og konventiónini um veðurlag (klima-konventiónini). Hetta verður gjørt sum liður í einari norðurlendskari/baltiskari verkætlan, kallað Biodiversitet 2000. Deildin er eisini við í einum bólki, ið skal klassa plantusamfeløg í Norðurlondum. Orsøkin til hetta arbeiði er, at ES í CORINE hevur klassa plantusamfeløgini uttan at taka hædd fyri norðurlendskum frávikum. Málið við arbeiðnum er sostatt fyrst og fremst at klassa plantusamfeløgini, men eisini at broyta klassingina hjá ES.

Hóast tað bert eru ráevnini í undirgrundini, ið eru yvirtikin, tekur jarðfrøðisdeildin sær av øllum uppgávum, ið hava at gera við føroysku undirgrundina sum heild. Jarðfrøðisdeildin hevur sera tætt samstarv við Oljufyrisitingina, ið tekur sær av øllum tí fyrisitingarliga sum t.d. loyvum og lógum. Oljufyrisitingin nýtir jarðfrøðisdeildina, tá ið tað snýr seg um vísindaligar kanningar. Eru uppgávur, ið eru ov umfatandi fyri føroysku jarðfrøðingarnar, verður GEUS (Grønlands og Danmarks Geologiske Undersøgelser) nýtt. Her má tó gjaldast fyri tað hjálp, ið fæst. Neyvt samstarv er longu frammanundan við GEUS, av tí at undirgrundin enn er ríkismál. GEUS er ein statsstovnur og hevur tí ávís rættindi og pligtir, tá tosað verður um føroysku undirgrundina. Á umráðum, ið hava samband við ráevnini í undirgrundini og framleiðsluna av hesum, hevur jarðfrøðisdeildin tó ábyrgdina. Hetta tí at ráevnini í undirgrundini sum longu nevnt vórðu yvirtikin í 1992 og gjørdust sostatt føroyskt sermál.
Tann deildin, ið í altjóða og sostatt eisini ES-høpi er mest áhugaverd, er djóradeildin, har millum annað hvalur og fuglur verður viðgjørdur. Djóradeildin hevur nógv samband við umhvørvisfelagsskapir o.l., av tí at grindahvalurin hevur verið nógv umrøddur í útheiminum. Ein tann størsti trupuleikin hjá djóradeildini í hesum sambandi er tann manglandi vitanin um grindahvalin. Henda manglandi vitan ger, at ofta verða fordómar, sum einki hava við veruleikan at gera, skaptir ímóti grindadrápið. Ein stór uppgáva hjá Náttúrugripasavninum er tí at upplýsa um grindahvalin og grindadrápið. Tað skal gerast tíðiligt fyri fólki,

ið ikki kenna til viðurskiftini í Føroyum, hvussu eitt grindadráp í veruleikanum gongur fyri seg, og eisini skal upplýsast um, at grindahvalurin ikki er eitt djóraslag í vanda. Besti mátin at verja seg fyri ágangi frá útheiminum er við at samla vitan um evnið, soleiðis at ein kann skjalprógva føroysku støðuna til grindadráp.

Eins og við grindadrápinum eru fólk úti í verð eisini við at fáa ein mótvilja ímóti fuglaveiðu og ræning av eggum. Hetta ger, at eisini á fuglaøkinum er neyðugt at vera sera varin við, hvat verður gjørt, og hvat verður sagt. Sum royndirnar úr Grønlandi vísa, kunnu umhvørvisfelagsskapirnir skapa nógvar trupuleikar fyri tað landið, sum teirra kampagnur eru rættaðar ímóti. Hóast hvørki grindadráp ella fuglaveiða, burtursæð frá tí mentunarliga økinum, eru týdningarmikil, fyri at føroyingurin sum so kann yvirliva, so er sera týdningarmikið at umhvørvisfelagsskapirnir ikki finna nakað, ið teir kunnu seta fingurin á. Stórur møguleiki er nevniliga fyri, at teir kunnu fáa fólk til at venda sær ímóti fiskivinnuni við t.d. ikki at keypa føroyskt flak í handlunum.

Ein annar stórur trupuleiki, sum Náttúrugripasavnið merkir nógv til, er forboðið ímóti at innflyta hvalatvøst til ES-marknaðin. Umsóknir um at fáa loyvi at innflyta tvøst, serliga til Danmarkar, ganga ígjøgnum Náttúrugripasavnið, og hetta gevur tí eyka umsitingarligt arbeiðstrýst. Harafturat tekur tað langa tíð at framskaffa hetta loyvið, og tí verður væl av tvøsti smugla inn til Danmarkar og sostatt til ES. Ístaðin fyri hesa keðiligu støðu er neyðugt at fáa betur reglur settar í gildi, soleiðis at føroyingar frítt kunnu hava tvøst við sær inn til ES-marknaðin.

## Toll og Skattstova Føroya

Tað er Toll og Skattstova Føroya, ið umsitur tann partin av sáttmálanum millum Føroyar og ES, ið snýr seg um tollviðurskifti. Av tí at sáttmálin inniheldur so nógvar ymiskar kvotur og loft, krevur hann heilt nógva umsiting. Umleið 10 fólk kring landið arbeiða við tollmálum, ið hava samband við ES. Øll arbeiða tó ikki við hesum umráðnum burturav. Afturat hesum koma so tollararnir kring landið.

Toll og Skattstovan hevur fingið gjørt eina skipan, ið skrásetur, hvussu nógv er útflutt av teimum ymisku vørunum, og nær ein er við at náa kvotuna. Henda skipan er góð sum ein vegleiðing, men Toll og

Skattstovan hevur ikki skyldu til at halda eyga við, um farið verður upp um kvoturnar/loftini. Hetta er ein uppgáva, sum liggur hjá ES myndugleikunum. Teir skulu siga frá tá ikki meira kann innflytast tollfrítt. Tað er tó hent bæði hjá Toll og Skattstovuni og hjá útflytarunum at vita, hvussu nógv er útflutt, og hvussu nær ein er kvotugreinsini, áðrenn vøran fer úr Føroyum. Ofta stendur vøran á goymslum ymsa staðir í ES, áðrenn hon verður fortollað. Hetta ger, at ein útflytari lættliga kann koma at útflyta í tí trúgv, at hetta verður selt tollfrítt, og so kemur kortini ein tollrokning, tí farið er uppum kvotuna.

Tað vísir seg, at flest allar tær kvotur og tey loft, ið eru ásett millum Føroyar og ES eru nóg høg. Einasta kvota sum varð uppbrúkt, ið 1997 var kvota 2. Hetta kann tó verða eitt sindur misvísandi, av tí at nakrar vørur verða seldar fyri ein lægri prís enn referencuprísin og verða sostatt ikki íroknaðar kvotuna.

Av tí at Toll og Skattstovan hevur skipað sína viðgerð av ES-málum sera væl, eru ikki nógvir trupuleikar av sáttmálanum, útyvir at hann krevur nógva umsiting. Umsitingin snýr seg bæði um at skipa tollingina av vørunum, men eisini um at svara fyrispurningum, ið fólk hava til sáttmálan. Serliga kann verða ringt at halda skil á, nær ein vøra hevur uppruna, og nær hon ikki hevur uppruna.
Tað hevur tó lætt um umsitingina, at tveir stórir fiskaútflytarar eru vorðnir góðkendir til sjálvir at skriva fakuravátttanir uttan mun til virði á tí útfluttu vøruni. Teir sleppa soleiðis frá at skula hava eitt stempul frá Toll og Skattstovuni hvørja ferð, útflutt verður.

Toll og Skattstovan hevur tó ein sera stóran trupuleika, tá ið tað snýr seg um samhandil við onnur lond. Hesin trupuleiki kemur av, at Føroyar ikki eru við í EBS avtaluni. Hetta ger, at tá ið EBS stendur sum upprunaland á tollskjølunum, skal tollur gjaldast í Føroyum. Føroyar hevur nevniliga onga avtalu við EBS sum samtak, hóast avtala er við øll EBS-londini sær. Sum einasta ES-land er Danmark góðkent til at yvirføra upprunan, t.v.s. at geva vørunum ES-uppruna, á EBS-vørum, ið verða innfluttar til Føroyar gjøgnum Danmark. Um ein vøra kemur úr Noreg til Danmarkar og síðan til Føroyar, hava donsku myndugleikarnir rætt til at geva vøruni danskan uppruna. Ein líknandi avtala er tó ikki gjørd við t.d. Noreg. Ein vøra, ið kemur úr einum ES-landi inn til Noreg verður merkt sum EBS vøra. Verður vøran síðan flutt til Føroya, <u>skal</u> gjaldast tollur av henni. Hetta tí at Føroyar ikki hava handilsavtalu við EBS, so hóast vøran t.d. er fronsk og Føroyar, ígjøgnum ES, hava avtalu við Frankaríki, má vøran viðgerast sum triðjalandsvøra.

Hesin trupuleiki kemur so at siga dagliga fyri á Toll og Skattstovu Føroya. Einasta møguleiki fyri at loysa henda trupuleika er at fáa EBS-útflytaran at skriva antin landanavnið ella ES sum upprunastað hjá vøruni. Hetta er tó trupult tí at londini, ið eru við í EBS hava gjørt sær til vana at skriva EBS sum upprunastað.

Ofta hava eisini tollararnir trupuleikar av fiski. Tá ið føroysk skip landa uttanlanda, krevur ES at teir skulu kunna vísa eitt vørucertifikat, ið er váttað av føroysku tollarunum. Hetta letur seg tó ikki gera, av tí at føroysku tollararnir ikki kenna vektina á fiskinum fyrrenn landað er. Trupuleikin verður loystur við at reiðarin, ið summum førum keyparin, stillar fíggjarliga trygd fyri møguligum tolli á fiskinum. Henda trygd krevst inntil tollskjølini eru í lagið frá føroyskari síðu.

## Fiskasølan

Fiskasølan er tann størsti fiskaútflytarin í Føroyum. Umleið 50% av øllum fiski, ið fer av landinum fer ígjøgnum Fiskasøluna. Talið broytist tó alt eftir fiskaslagnum, t.d. verður stórt sæð ongin heilur laksur útfluttur av Fiskasøluni. Orsakað av hesi stóru sølu og fleiri ára arbeiði við sølu til ES-marknaðin hevur Fiskasølan nógvar royndir og hollan kunnleika til marknaðarviðurskiftini millum ES og Føroyar. Trupuleikarnir, ið Fiskasølan hevur, vísa seg at verða stórt sæð teir somu, sum teir trupuleikar hinir útflytararnir hava.

Sagt verður, at reglurnar, ið skulu uppfyllast, tá ið útflutt verður til ES-marknaðin, eru sera torskildar, men at hetta hevði verið í lagið, um reglurnar vóru tær somu allastaðir og til eina og hvørja tíð. Hetta er tó ikki soleiðis.

Tað er sera ymiskt, hvussu verandi reglur verða skiltar. Ein sending kann verða viðgjørd á ein hátt í Hirtshals og á ein annan hátt í Rotterdam. Havnirnar hava fingið boð um at kanna so og so nógv prosent av øllum fiski, ið kemur úr Føroyum, men onkustaðni verður hetta skilt sum, at hesi prosentini av hvørjari sending skulu kannast, onkustaðni sum prosent av hvørjum skipi og aftur aðrastaðni sum prosent av árliga innflutninginum. Ymiskt er eisini hvørjar heilsufrøðiligar royndir verða tiknar av hesum fimm prosentunum, og hvussu langa tíð tað tekur at fáa úrslitið av royndunum. Hetta ger, at útflytarin ongantíð veit, hvørjum eftirliti sendingin verður útsett fyri, og hvussu langa tíð hetta eftirlit tekur. Tað er tí trupult at

gera fastar avtalur við keyparan, um nær sendingin skal avhendast. Harafturat kann tað gerast dýrt at útflyta feskan fisk um eftirlitið kemur at taka langa tíð, tí fiskurin missir virðið, meðan kanningin fer fram.

Eisini avgjøldini fyri heilsufrøðiligu royndirnar eru sera ymisk. Tey kunnu skifta ímillum 2 oyru fyri tonsið og 7 oyru fyri tonsið. Tað, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan longu í Føroyum hevur góðkent sendingina, hevur við sær, at kanningin í ES-havnini er eitt sindur lagaligari enn mótvegis øðrum triðjalondum. Tó eru skjølini frá Starvsstovuni í onkrum havnum einki verd. Har verða føroyskar sendingar javnmettar við t.d. sendingar úr Afrika. Serliga ger hetta seg galdandi fyri hollendskar og týskar havnir.

Tollmyndugleikarnir í ES-limalondunum eru nú byrjaðir at krevja, at frumskjøl skulu fylgja við øllum sendingum. Hetta skapar stórar trupuleikar hjá t.d. Fiskasøluni. Skjølini skulu vera klár, tá skipið fer av Havnini, men ofta eru virkini í Suðuroy enn í ferð við at framleiða. Her er tí ongin møguleiki fyri at hava frumskjøl saman við sendingini. Harafturat stendur í avtaluni millum Føroyar og ES, at møguleiki er fyri at eftirsenda skjøl. Á Fiskasøluni verður hildið, at hóast tollmyndugleikarnir ongantíð hava havt trupuleikar við at fáa eftirsend skjøl frá Fiskasøluni, so eru aðrir føroyskir útflytarar, ið forsøma hetta og tí oyðileggja fyri øll. Hetta er ógvuliga keðiligt og ger tað dagliga arbeiði tungt.

Referencuprísirnir eru eins og hjá hinum útflytarunum ein stórur trupuleiki hjá Fiskasøluni. Serliga tað at prísirnir eru ov lítið útgreinaðir er keðiligt. Annan floks fiskur, ið jú kann seljast á ES marknaðinum, kemur ikki altíð uppá referencuprísin, tí at hesin er ásettur eftir fyrsta floks prísi. Ein trupuleiki er eisini, at prísurin verður ásettur eftir, hvussu prísirnir vóru árið fyri. Hetta ger, at um prísirnir hava verið góðir eitt ár og síðan fara niður árið eftir, fer referencuprísurin ikki upp fyrrenn tað ár, tann lági fiskaprísurin er. Munurin millum referencupris og marknaðarpris gerst sostatt alt ov stórur.

Ein líknandi útgreiningartrupuleiki er eisini innan útflutning av laksinum. Heilur laksur og viðgjørdur laksur kemur undir somu kvotu. Laksakvotan verður tískil skjótt uppi vegna útflutningin av heilum laksi, og tað skal so gjaldast fullur tollur av restini av útflutta laksinum. Hetta ger, at tað illa loysir seg at viðgera laksin til t.d. verðar (portiónir). Dømi er eisini um okkurt virki, ið útflytur heilan laks til egi virki í Danmark fyri síðan at viðgera laksin har.

Fiskasølan heldur tað vera sera gott, at eitt føroyskt umboð er sett fast í Bruxelles. Av týdningi fyri eitt tílikt virki er, at fylgt verður við í, hvat hendir innan matvørulóggávuna og merkingarlóggávuna. Á henda

hátt er tað nemmari fyri føroysku útflytararnar at fyrireika seg til møguligar broytingar, áðrenn tær gerast eitt krav. Ymisk hagtøl hava somuleiðis sera stóran áhuga, millum annað hvussu nógv er brúkt av kvotuni.

## Havsbrún

Havsbrún er eitt virki, ið framleiðir fiskamjøl og fiskalýsi, fiskifóður, djórafóður og frystan makrel og sild. Stórur partur av framleiðsluni verður selt til útflutnings, tó ikki alt til ES-marknaðin. Til henda markna er tað mest fiskamjøl, fiskalýsi og fiskafóður, ið verður útflutt. Fiskamjølið og fiskalýsið geva ongar trupuleikar í samband við ES, men tá ið tað snýr seg um fiskafóður, eru trupuleikarnir fleiri, og trupult er at fáa teir loystar.

Byrjað var at framleiða fóður í 1994, og trupuleikarnir, ið byrjaðu tá, hava stórt sæð verið teir somu síðani. Ein tann størsti er tann langa avgreiðslutíðin í ES. Tá ein kundi ringir til Havsbrún og bíleggur eina sending av fiskafóðuri, má Havsbrún biða um útflytingarloyvi úr Newcastle (hetta tí at flestu bíleggingarnar eru úr Hetlandi). Síðan skal skrivstovan í Newcastle seta seg í samband við røttu myndugleikarnar í Bruxelles, sum so geva játtan til innflutning av vøruni. Fyri at fáa hetta útflutningsloyvi skal peningur setast sum trygd fyri, at vøran er í lagið, og Havsbrún hevur vanliga umleið 100.000 krónur bundnar til hetta endamál. Tá loyvi er komið, skulu heilsufrøðiligar góðkenningar fáast til vega og skjøl útfyllast. Alt hetta pappírarbeiði tekur umleið 14 dagar.

Tá sendingin so er send avstað og er komin til innflytaralandið, skal hon setast á eina sergoymslu, har royndir aftur skulu takast fyri at vita, um fiskafóðuri er heilsufrøðiliga í lagið, og um tað er tað sama sum tað fóðuri, ið er umfatað av sáttmálanum millum Føroyar og ES. Er hetta í samsvar við verandi krøv, verður tann peningur, ið settur er sum trygd, afturgoldin.

Sáttmálin millum Føroyar og ES innihelt at byrja við bert eitt slag av fiskafóðuri, og hetta ávisa slagið varð ásett, uttan at Havsbrún varð spurt um, hvat slag tey framleiddu. Síðan hevur Havsbrún roynt at fáa fleiri sløg við í sáttmálan, men hetta hevur tikið sera langa tíð. Tó hevur nú eydnast at fáa tvey nýggj sløg við í sáttmálan. Havsbrún framleiðir bert annað slagið, hitt er ókent fyri leiðsluni. Av tí at tað tekur so langa tíð at fáa nýggj fóðursløg løgd afturat sáttmálanum, leggur Havsbrún seg ikki eftir at skapa onnur fóðursløg

enn tey, ið standa í sáttmálanum. Ístaðin verður miðað ímóti at uppfylla krøvini hjá ES so neyvt sum gjørligt. Tað er sostatt sáttmálin millum Føroyar og ES, ið avgerð, hvørja vøru Havsbrún framleiðir.

Havsbrún hevur havt eina sak koyrandi við bretsku tollmyndugleikarnar um afturgoldið "trygdargjald". Trupuleikin var, at Havsbrún í eina tíð hevði fingið afturgoldið pening, og tá myndugleikarnir kannaðu vøruna var innihaldið av stívilsi í fóðurinum ov lítið. Vøran var sostatt ikki tann, ið avtala varð gjørd um. Tollmyndugleikarnir kravdu, at Havsbrún skuldi afturgjalda allan tann pening, ið var teimum goldin ov nógv. Endin var tó, at semja varð gjørd um, at Havsbrún skuldi afturgjalda umleið helvtina av peninginum.

Av tí at umboðsmaðurin í Hetlandi eisini kundi verða kravdur eftir pengunum, gav hetta sjálvsagt trupuleikar millum umboðsmannin og Havsbrún. Av tí at umboðsmaðurin hevði álit á Havsbrún, varð ein fyribils loysn gjørd, og útflutningurin kundi halda á fram. Tað verður tó sagt á Havsbrún, at var hetta álit ikki, so hevði Havsbrún givist við at útflyta fiskafóður. Hildið verður, at sambandið millum Føroyar og ES er alt ov tengt at, at ein hevur góð viðurskifti við ein rættan persón í ES-limalandinum. Hetta merkir sostatt, at um hesin persónur fellur frá, skapar tað stórar trupuleikar fyri føroyska útflytaran. Tí er samhandilin við ES sera trupul og ósikkur.

Ein annar stórur trupuleiki er, at Havsbrún ikki fær at vita um tær broytingar, ið eru á veg. Avleiðingin av hesum er, at ikki fyrrenn ein lastbilur ella eitt skip við fiskafóðuri stendur fast, fær Havsbrún at vita um hesar broytingar og hevur sostatt als ikki tíð til at broyta viðurskiftini. Meiri kunning og greiðari viðurskifti í avtaluni millum Føroyar og ES eru sostatt høvuðsynski Havsbrúns í samhandlinum við ES.

## Arbeiðsgevarafelagið

Arbeiðsgevarafelagið er, sum orðið sigur, felag arbeiðsgevaranna. Fyrr vóru uppgávur felagsins mest tengdar at sáttmálum og tílíkum, men nú tekur felagið sær eisini av beinleiðis trupuleikum hjá vinnuni. Hesir trupuleikar skulu sjálvandi vera av almennum áhuga millum arbeiðsgevararnar. Tað verður sostatt ikki arbeitt fyri einstakar arbeiðsgevarar. Limir felagsins eru frá allari vinnuni, men meginparturin arbeiðir

sjálvsagt innan fiskivinnuna. Sum vera man, hevur Arbeiðsgevarafelagið sostatt gott innlit í, hvat rørir seg í vinnuni.

Tá ið tosað verður um útflutning, snýr hesin seg stórt sæð bert um fisk. Av tí at Arbeiðsgevarafelagið eisini umboðar útflytararnar, verður víst á so at siga somu trupuleikar við ES, sum útflytararnir vísa á. Tað vil siga referencuprísir, heilsufrøðiligar kanningarnar, kvotur o.l. Skrivarin í felagnum leggur tó afturat, at hetta bert eru symptomir, og áðrenn føroyingar sjálvir vita, hvar teir ynskja at standa í altjóða og ES-høpi, er trupult at fáa bilbugt við sjúkuni. Til dømis mugu tey ógreiðu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark fáast í rættlag, soleiðis at eingin yvi er um, hvønn status Føroyar hava í sambandinum við ES. Ein føroyingur kann til dømis fáa ES-pass, hóast hann ikki er ES-borgari. Hetta er løgið, men hevur verið til stóra hjálp hjá handilsreisandi, ið fyrr hava havt trupuleikar av, at tað bæði stóð Føroyar og Danmark á passinum. Flest allir handilsreisandi hava tikið av møguleikanum og hava skift pass sítt um frá føroyskum passi til ES-pass.

Arbeiðsgevarafelagið hevur umboð við í nevndini, sum er við at fyrireika nýggjar samráðingar við ES. Av hesari orsøk vil skrivarin í felagnum treyðugt úttala seg ov nógv um, hvar Føroyar skulu halda seg í mun til ES. Hann heldur tó, at av tí at Føroyar eru ein so lítil marknaður hjá ES, er týdningarmesta tólið vitan. Neyðugt er at fáa vitan um, hvat rørir seg í ES so tíðliga sum gjørligt, soleiðis at ein kann fyrireika seg til møgulig nýggj tiltøk. Eisini heldur hann, at ein umboðsmaður í Bruxelles skal profilerað ES í føroysku fjølmiðlunum, soleiðis at føroyingar fáa eina meira veruliga mynd av, hvat ES er, og hvat tað ikki er.

## Samanumtikið

Tosið um Føroyar og ES er í stóran mun merkt av teimum trupuleikum, ið standast av avtaluni millum Føroyar og ES. Serliga illa nøgd er fiskivinnan, og eru tað her heilsufrøðiliga skipanin, referencu-prísirnir, upprunareglurnar o.s.v., sum gera tað dagliga arbeiði tungt. Tað eru tó trupuleikar, ein hoyrir minni um, men sum kunnu gerast álvarsligir í framtíðini. Hetta er t.d. teir trupuleikar, ið lesandi og granskarar hava av, at øll hini Norðurlondini í størri og minni mun eru knýtt at ES, og tí gera minni og minni við norðurlendskt samstarv.

Felags fyri tey virki og stovnar tosað er við, er at tey hava djúpa vitan á sínum umráðið, men fá hava nakra heildarmynd av, hvar Føroyar standa í mun til ES, og hvørjir fyrimunir og vansar eru við einum tættari tilknýti. Tí er alneyðugt at fáa eitt alment kjak ígongd um, hvat føroyingar framyvir vilja. Áðrenn vit vita, hvar vit standa, er ringt at melda klárt út mótvegis ES-myndugleikum og teimum krøvum, ið verða stillaðið.